# Saman um **grønu** framtíðina

**UMHVØRVISPOLITIKKUR** FYRI TÓRSHAVNAR KOMMUNU **2026-2032**



SAMAN UM GRØNU FRAMTÍÐINA

ALTJÓÐA FOKUS **6**

UMHVØRVIÐ Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU **8**

HØVUÐSMÁL **10**

AMBOÐ **12**

GRUNDARLAGIÐ **12**

NÁTTÚRA OG LÍVMARGFELDI **16**

Hetta ætlar kommunan **18**

ÚTLÁT OG ORKA **30**

Hetta ætlar kommunan **32**

RINGBÚSKAPUR OG BURTURKAST **42**

Hetta ætlar kommunan **44**

Útgevari: Tórshavnar Kommuna

Samskipan: Rannvá M. Arge og Óluva Zachariasen
Myndir: Úr egnum myndasavni og frá
Faroephoto v/Ólavi Frederiksen
Uppseting: Sendistovan
Prentumsiting: Sendistovan

# FORORÐ

Umhvørvispolitikkurin hjá Tórshavnar kommunu er íløga í okkara felags framtíð. Ein íløga í eina sunna og burðardygga kommunu, har umhvørvisfyrilit, vælferð og trivnaður ganga hond í hond.

Við greiðum málum og átøkum skapa vit broytingar, sum gagna bæði náttúru, menniskjum og vinnulívi.

Heimurin hevur stórar avbjóðingar at loysa: Veðurlags-broytingar, plantu- og djórasløg, sum hvørva, og dálking. Stór tøk skulu takast fyri at venda gongdini.

> VIÐ **PARÍS-SÁTTMÁLANUM** HAVA **FLESTU LOND** BUNDIÐ SEG TIL AT **MINKA ÚTLÁTIÐ** AV VAKSTRARHÚSGASSI

# Saman um grønu framtíðina

## ALTJÓÐA FOKUS

Veðurlagsbroytingar eru millum størstu avbjóðingar, vit hava. Seinastu mongu árini hava fleiri altjóða stovnar og felagsskapir sett tær ovast á dagsskrá.

Veðurlagsnevndin hjá ST, IPCC[1], staðfestir, at menniskjaligt virksemi uttan iva eigur ábyrgdina av, at jørðin hitnar, og at veðurlagsbroytingar henda. Frágreiðingar hjá nevndini vísa eisini, at smá samfeløg og oyggjar eru serliga útsett fyri avleiðingum av veður-

**1** *IPCC (Intergovernmental Panel on Climate Change) er veðurlagsnevndin hjá ST. Nevndin varð sett á stovn í 1988 sum uppfylging upp á Brundtlandrapportina. www.ipcc.ch*



lagsbroytingum, so sum hækkaðari vatnstøðu, harðveðri og minkandi lívmargfeldi.

Við París-sáttmálanum hava flestu lond bundið seg til at minka útlátið av vakstrarhúsgassi, so hækkingin í alheimsmeðalhitanum er væl undir 2°C og helst ikki meiri enn 1,5°C. Fleiri lond hava sett sær fyri at minka útlátið av vakstrarhúsagassi við eini helvt í 2030.

Eisini eggjar París-sáttmálin til, at veðurlagsátøk verða hugsað inn í eitt nú lendisnýtslu, almennar tænastur og ferðavinnu-infrakervi.[2]

Landið hevur sum mál at minka útlátið av vakstrarhúsgassi.[3] Tað er við støði í nevndu altjóða sáttmálum og landspolitisku málunum, at Tórshavnar kommuna ger sín umhvørvispolitikk fyri 2026-2032.

**2** *Føroyar hava tikið undir við altjóða veðurlagssáttmálanum frá 1992 og París-sáttmálanum frá 2015. Sáttmálarnir leggja dent á, at øll lond eftir førimuni skulu minka útlátið av vakstrarhúsgassi, so hitaøkingin á jørðini kann steðga innan hesa øldina. Hetta er neyðugt, skulu vit megna at tálma álvarsligu avleiðingunum av veðurlagsbroytingum.*

**3** www.landsstyri.cdn.fo/*savn/50pkkzwe/uppskot-til-ll-um-vedurlagslog-at-senda-i-almenna-hoyring.pdf?s=3XY2HPrkOIvL-CicwIj3ZN0_ZrQ*

## UMHVØRVIÐ Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU

Tórshavnar kommuna er ein livandi kommuna við ríkum møguleikum. Kommunan er vaksin nógv seinastu árini, bæði í fólkatali og virksemi. Nýggir bygningar, infrakervi og tænastur eru komin afturat. Tað økta virksemið hevur havt við sær størri trýst á umhvørvið.

Ov fá hagtøl og ov lítil vitan er um lívmargfeldið, bæði í Tórshavnar kommunu og í Føroyum sum heild. Ongin skipað skráseting er av náttúruni, og tí er heldur ikki eitt samlað, alment yvirlit yvir t.d. náttúrusløg, plantur og djóralív tøkt, tó at einstakar skrásetingar eru gjørdar. Tað er greitt, at nógv upprunanáttúra er undir trýsti, m.a. við at vátlendi eru drenað, hagalendi eru ávirkað av ovurbiti, og innræsin sløg hótta lívmargfeldið.

Fleiri grøn átøk eru sett í verk í kommununi seinastu árini, sum hava lækkað $CO_2$-útlátið á fleiri økjum. T.d. vísa talvurnar á síðu 33, at munandi fleiri fermetrar av kommunalum bygningum vera hitaðir við grønari orku í 2024 sammett við 2016. Tørvur er tó á einum fullfíggjaðum yvirliti yvir alla orkunýtslu í kommununi, soleiðis at til ber at fylgja gongdini neyvt yvir tíð. Stig eru tikin til at betra hagtalsgrundarlagið á hesum øki.

Tá ið tosað verður um burturkast, sæst ein ávís gongd rætta vegin. Talvan niðanfyri vísir kilo av brendum burturkasti pr. íbúgva frá 2016 til 2024, og her sæst ein minking. Tó eru broytingarnar smáar, og tørvur er framvegis á at minka burturkastið og økja endurnýtsluna.

Samanlagt vísa hesi viðurskifti eina kommunu, sum støðugt arbeiðir fram ímóti eini grønari framtíð. Tó vil kommunan gera meira fyri at fáa vøkstur, býarmenning og burðardygd at ganga hond í hond. Við vitanarmenning, neyvum dátugrundarlagi og málrættaðum átøkum strembar Tórshavnar kommuna komandi árini eftir at tryggja, at umhvørvislig, fíggjarlig og sosial burðardygd ganga upp í eina hægri eind.

**Kg brent pr íbúgva***




**Talva 1** *Kilo av burturkasti brent á Kommunalu Brennistøðini árini 2016-2024 roknað pr. íbúgva. Vinnuburturkast er við í tølunum.*

**Í 2019 og 2022 vórðu størri umvælingar gjørdar, og nakað av burturkastinum varð sent til Danmarkar at brenna.*

*Kelda: Kommunala Brennistøðin*

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA STREMBAR EFTIR AT VERA MILLUM FREMSTU KOMMUNUR Í NORÐURLONDUM INNAN UMHVØRVISLOYSNIR, OG AT ÚTLÁTIÐ AV VAKSTRARHÚSGASSI Í 2040 ER NETTO-NULL**

## HØVUÐSMÁL

Umhvørvið skal hava eitt týdningarmikið pláss í øllum avgerðum hjá Tórshavnar kommunu. Kommunan setir krøv til sín sjálvs, veitarar, samstarvspartar og borgarar. Eisini fer kommunan at arbeiða fyri at fáa góð samstørv við landsmyndugleikar, vinnulív, vitanarstovnar, áhugafeløg og borgarar, soleiðis at vit saman kunnu røkka langt á umhvørvisleið.

### Yvirskipaða málið er, at:

Tórshavnar kommuna strembar eftir at vera millum fremstu kommunur í Norðurlondum innan umhvørvisloysnir, og at útlátið av vakstrarhúsgassi í 2040 er netto-null.

At útlátið av $CO_2$ er netto-null merkir, at útlát og upptøka av $CO_2$ javnviga.

### Umhvørvispolitikkurin leggur dent á hesi trý høvuðsøki:

**Náttúra og lívmargfeldi:** Ein kommuna við sterkum vistskipanum, har náttúra og menniskju trívast

**Útlát og orka:** Ein kommuna við munandi minni útláti av vakstrarhúsgassi. Í 2040 skal útlátið av vakstrarhúsgassi í Tórshavnar kommunu sum landafrøðiligari eind vera netto-null

**Ringbúskapur og burturkast:** Ein kommuna við burðardyggari nýtslu og minni burturkasti. Samlaða nøgdin av burturkasti at brenna skal minka 20% í 2030 sammett við 2024

Høvuðsøkini eru deild í 19 lutmál, sum kommunan ætlar at røkka. Til at røkka málunum eru ásett ítøkilig átøk at fremja komandi árini. Umhvørvispolitkkurin fevnir um tíðarskeiðið 2026 til 2032, men summi av málunum peika tó longri fram í tíð.



## AMBOÐ

Eitt týdningarmikið amboð í umhvørvispolitikkinum er ein virkisætlan, sum útgreinar, hvussu málini verða rokkin og átøkini útint. Í virkisætlanini er tíðar- og kostnaðarmeting umframt áseting um, hvør hevur ábyrgd av at útinna einstøku átøkini. Virkisætlanin verður endurskoðað javnan - og í minsta lagi annað hvørt ár.

Umhvørvið skal takast við sum eitt týðandi atlit í raðfestingum og avgerðum hjá kommununi. Deildir og stovnar skulu hava umhvørvisstýring, sum er ein skipað tilgongd at fremja grøna skiftið. Umhvørvisstýringin hevur m.a. við sær, at ítøkilig mál hvørt ár skulu setast fyri umhvørvisarbeiðið.

Hagtalsgrundarlagið skal styrkjast soleiðis, at gott yvirlit er yvir støðu og framstig í umhvørvismálum.

Neyðug orka skal setast av til at røkka teimum málum, sum politikkurin setur, bæði viðvíkjandi fíggjarligari játtan og arbeiðsorku innan- og uttanhýsis.

## GRUNDARLAGIÐ

Umhvørvispolitikkurin tekur støði í Kommunuætlanini og øðrum politikkum hjá kommununi, so sum Ferðavinnupolitikkinum og Vinnupolitikkinum umframt Grønu Leiðini frá 2016 og Orkupolitikkinum.

Harumframt byggir umhvørvispolitikkurin á borgarafund, fund við staðbundnu nevndirnar, verkstovur, frágreiðingar, samrøður við viðkomandi partar og talgildan pall, har borgarar høvdu møguleika at koma við íkasti.

Eisini tekur umhvørvispolitikkurin støði í heimsmálunum hjá ST fyri burðardygga menning. Umhvørvispolitikkurin fevnir víða, og málini, ið eru tikin við, hava øll týdning fyri einstøk lutmál í politikkinum. Málini á næstu síðu verða mett at hava størst týdning fyri umhvørvismálini hjá kommununi.


2 EINGIN HUNGUR
3 GÓÐ HEILSA OG VÆLFERÐ
6 REINT VATN OG REINFØRI
7 BURÐARDYGG ORKA
9 VINNA, NÝSKAPAN OG UNDIRSTØÐUKERVI
11 BURÐARDYGGIR BÝIR OG BÝLINGAR
12 ÁBYRGDARFULL NÝTSLA OG FRAMLEIÐSLA
13 VEÐURLAGSÁTØK
14 LÍV Í HAVI
15 LÍV Á LANDI
17 SAMSTARV UM HEIMSMÁLINI
TORSHAVNAR KOMMUNA





# Náttúra og lívmargfeldi

HØVUÐSMÁL 1

## Ein kommuna við **sterkum vistskipanum**, har **náttúra** og **menniskju trívast**

Heimsins náttúra er trýst. Heilar vistskipanir kunnu smokka saman, tí týðandi javnvágir og evnaringrásir verða órógvaðar. Orsøkin er m.a. dálking, lendisnýtsla, veðurlagsbroytingar og innræsin sløg, sum órógva natúrligu vistskipanirnar.

Eisini í Føroyum er náttúran ávirkað. Tórshavnar kommuna er onki undantak. Fólkatalið økist í kommununi, og tað merkir økt byggivirksemi til eitt nú bústaðir, dagstovnar, røktarheim, vegir, kaiøki og vinnubygningar. Vátlendi eru drenað til bygging, og innræsin sløg sum eitt nú skøra hótta lívmargfeldið. Alneyðugt er tí at verja og styrkja vistskipanir og lívmargfeldið.



## Hetta ætlar kommunan

Kommunan raðfestir góð, mótstøðuførandi og sunn býar- og bygdaumhvørvi, har náttúra og menniskju trívast saman. Vit skulu menna vitan um náttúruna, raðfesta nýtslu og tryggja reint umhvørvi á landi og við strendur. Stig eru tikin til at skráseta lendið í kommununi, ið skal brúkast sum avgerðargrundarlag til bygging, friðing og at síggja gongdina.

Byggivirksemi skal hava fyrilit fyri náttúru og geva íkast til at verja lívmargfeldið. Kommunan fer at byggja upp samstørv at verja náttúruna og fer við innkeyps-politikki o.ø. amboðum at stuðla upp undir átøk, sum taka umhvørvisfyrilit.

Kommunan setur sær hesi lutmál:

1 Gera lendisætlan og kortleggja náttúru
2 Bygging við virðing fyri náttúruni
3 Sjógvur, vøtn og áir skulu vera rein
4 Skynsom vatnnýtsla og reint drekkivatn
5 Landbúnaður og náttúra í javnvág
6 Verja og stimbra føroyska lívmargfeldið
7 Avmarka ampar av óljóði, ljósi og tungari ferðslu
8 Tilbúgving til veðurlagsbroytingar

## 1. GERA LENDISÆTLAN OG KORTLEGGJA NÁTTÚRU

Tað er umráðandi at hava vitan um okkara náttúru.

Tórshavnar kommuna tekur stig til at kortleggja náttúruøkini í kommununi, bæði innan- og uttangarðs. Staðfestast skal, hvat slag av náttúru er í kommununi - vátlendi, heiðalendi o.a. Metast skal eisini um nyttu- og dýrdarvirði, og harumframt skulu metingar gerast av, hvussu ávirkað náttúran er av eitt nú bygging og landbúnaði.

Skrásetingararbeiðið skal vera grundarlag undir avgerðartilgongdini, tá ið støða skal takast til framtíðar útbyggingar og/ella varðveitslu av lendi. Í samstarvi við avvarðandi stovnar og í samsvari við náttúruverndarlógina skal støða takast til, um ávíst øki skal friðast, verjast, endurbøtast o.s.fr.

Samlað lendisætlan skal gerast fyri náttúru, bústaðaøki, vinnu og landbúnað. Grøn øki og øki við upprunanáttúru skulu raðfestast.

Tá ið øki verða tikin til bygging, og byggisamtyktir og útstykkingarætlanir verða gjørdar, skal tað samsvara við lendisætlanina. Screening og møgulig umhvørvisárinsmeting skulu altíð gerast, áðrenn avgerð verður tikin um at játta hesum. Áðrenn kommunalar byggiverkætlanir verða settar í verk og byggiloyvi latið, skal meting gerast, sum kortleggur, hvørja ávirkan verkætlanin hevur á náttúru og umhvørvi - bæði undan, undir og eftir útinnan av verkætlanini, so ansur verður vístur fyri serliga útsettum, umhvørvisligum viðurskiftum. Er vandi fyri stórum umhvørvisligum avleiðingum, skulu tillagingar gerast at minka árinini, ella má onnur staðseting finnast.

**Átak: Náttúran í Tórshavnar kommunu skal kortleggjast. Ein yvirskipað kortlegging av náttúruni skal vera liðug í 2027, sum lýsir sløg av náttúru og lendi. Lendisætlan skal gerast, sum ásetur, hvør nýtsla kann vera í ymsu økjunum.**
*Ábyrgd: Kommunan í samstarvi við serkøn*

**Átak: Áðrenn lendi verður lagt av til bygging, og tá ið byggisamtyktir og útstykkingarætlanir verða gjørdar, skulu screening og/ella umhvørvisárinsmetingar gerast.**
*Ábyrgd: Kommunan*



## 2. BYGGING VIÐ VIRÐING FYRI NÁTTÚRUNI

Vaksandi fólkatalið í kommununi hevur havt nógv byggivirksemi við sær. Bygging og býarmenning skulu hava virðing fyri náttúruni og eiga at troyta møguleikar innan fyri verandi bý/bygd heldur enn at fara út í náttúruna ella út um verandi býar- og bygdarmørk. Havast skal altíð í huga, at lendið er avmarkað, og at hvør fermetur má brúkast við skili.

Verða inntriv gjørd í náttúru, skal strembast eftir at endurbøta oyðiløgdu náttúruna. Øll bygging má hava virðing fyri lendinum og fyri varðveitingarverdum lendiseyðkennum. Tað sama er við áum og økinum við sjóvarmálan.

Gott eftirlit skal vera við byggiverkætlanum fyri at tryggja, at umhvørviskrøvini verða hildin.

**Átak: Bygging uttan fyri verandi bý/bygd skal avmarkast. Bygging skal helst fara fram í verandi bygdum øki.**
*Ábyrgd: Kommunan*

**Átak: Ásetast skulu krøv í t.d. byggisamtyktum um, at í øllum størri kommunalum byggiverkætlanum skal ein ávísur partur av økinum setast av til at varðveita og menna lívmargfeldið.**
*Ábyrgd: Kommunan*

## 3. SJÓGVUR, VØTN OG ÁIR SKULU VERA REIN

Áir og vøtn skulu hýsa fjølbroyttum djóra- og plantulívi, og fólk skulu kunna dvølja trygt við sjóvarmálan. Sjógvurin skal vera nóg reinur at svimja í, og spillivatn, aling, skipaferðsla og annað virksemi mugu ikki hava skaðilig árin á lívið í áum, sjónum og við sjóvarmálan.

Avbjóðingarnar við spillivatni skulu loysast.[4] Spillivatnsætlan er gjørd, og hon skal fremjast. Rørleiðingar við spillivatni, sum í dag renna út í fjøru, áir ella veitir, skulu ígjøgnum reinsiskipanir, áðrenn tað verður leitt út á sjógv.

Reinsianlegg skulu endurhugsast. Í løtuni hevur kommunan mekanisk reinsianlegg. Sambært spillivatnsætlanini fer kommunan at menna skipanirnar fyri at betra um reinsing av spillivatni t.d. við lívfrøðiligari ella evnafrøðiligari reinsing. Hetta fer at betra um umhvørvisgóðsku og lúka altjóða krøv og fer samstundis at gera tað møguligt at lata reinsaða spillivatnið fara út í áir ella á sjógv.

Møguleikarnir at fara á seiðaberg og fáa heimapart í grind skulu vera góðir og ikki nervaðir av dálking. Hóskandi og trygg øki skulu vera við sjóvarmálan at fara á seiðaberg.



Stig verða tikin til loysnir á vatnmongdum frá byggivirksemi og veðurlagsbroytingum, sum leggja trýst á rørleiðingar og pumpuskipanir. Vit skulu hava lendi, vøkstur og skipanir, sum kunnu taka ímóti øktum vatnmongdum.[5]

**Átak: Spillivatnsætlanin skal fremjast, og raðfestast skulu bæði langtíðarloysnir og bráðfeingis átøk. Eisini kannar kommunan nýggjar møguleikar at reinsa spillivatn.**
*Ábyrgd: Kommunan*

**4** *Kanningar hava staðfest antibiotika-mótstøðuførar bakteriur og aðrar bakteriur nærhendis frárenslum á sjógvi og landi í Havn.*

**5** *Eitt nú LAR-loysnir á spæliplássum, parkeringsøkjum og blómubeðum. https://www.teknologisk.dk/lokal-afledningaf-regnvand-lar/28273*



## 4. SKYNSOM VATNNÝTSLA OG REINT DREKKIVATN

Við øktum íbúgvaratali økist vatntørvurin, bæði til drekkivatn, brúksvatn og til vinnuendamál. Umráðandi er at nýta vatn við skili.

Í staðin fyri at taka stór náttúruøki inn til vatngoymslur tekur kommunan stig til skynsamari nýtslu av vatni, m.a. við vatnmátarum á kommunalum stovnum og kunning, sum vendir sær bæði til starvsfólk og borgarar. Á kommunalum støðum skulu sensorar og onnur tøkni nýtast til at minka vatnnýtsluna, og harumframt skal mark setast fyri vatnnýtslu á byggiplássum. Hetta sparir náttúruøki og minkar $CO_2$-útlát frá reinsiverkum.

Økið rundan um vatnveitingina skal verjast soleiðis, at vit hava reint vatn í kommununi. Umráðandi er, at atgongd er til bæði yvirflatu- og grundvatn. Møguleikin at fáa reint vatn úr tunlum skal kannast.

**Átak:** **Kommunan tekur stig til skynsamari nýtslu av vatni, bæði í kommununi sum stovnur og innan kommunumark.**
*Ábyrgd: Kommunan*

**Átak:** **Tryggjast skal, at reint drekkivatn í framtíðini fæst frá bæði yvirflatu- og grundvatni.**
*Ábyrgd: Kommunan*

## 5. LANDBÚNAÐUR OG NÁTTÚRA Í JAVNVÁG

Kommunan fer at virka fyri størri matsjálvbjargni, og her hevur landbúnaðurin ein týðandi leiklut. Nærum helvtin av mjólkarframleiðsluni í Føroyum liggur í Tórshavnar kommunu, og her eru eisini nógvir seyðabøndur. Landbúnaðurin skal hava góðar karmar, og samstundis skal tryggjast, at taðing o.a. er til minst møguligan ampa.

Í fleiri økjum í kommununi er matframleiðsla við eitt nú grønmeti, eggum, seyða- og neytakjøti. Og útróðrarfólk koma til lands við fiski. Í Vágsbotni er marknaður við fiski og føroyskum mati. Hesir møguleikarnir skulu víðkast, so enn fleiri kunnu selja og keypa stuttfluttar vørur á marknaði og/ella matstøðum.

Innkeypspolitikkurin skal tryggja, at kommunan og kommunalir stovnar raðfesta lokalar rávørur til kantinur, tiltøk o.a. Matvørur, sum eru framleiddar umhvørvisliga skynsamt og burðardygt, skulu hava fyrimun.

Stórur áhugi er fyri velting/felagsveltum. Strembað verður eftir at hugsa felags urtagarðar og beðøki inn í bæði nýggj og verandi bústaðaøki. Ein møguleiki er at bjóða traðir/øki hjá kommununi út til fólk, sum vilja velta eplir, røtur og grønmeti. Eisini hjá skúlum og dagstovnum skal vera møguligt at dyrka grønmeti.

**Átak: Kommunan hugsar møguleikarnar fyri sjálvveiting av grønmeti inn í bústaðaøki og stuðlar upp undir umstøður, har lokalir matframleiðarar og -keyparar kunnu møtast.**
*Ábyrgd: Kommunan*

**Átak: Kommunan raðfestir innkeyp av lokalt framleiddum matvørum, har tað ber til. Dentur skal leggjast á stuttflutt, vistfrøði og fairtrade.**
*Ábyrgd: Kommunan*



## 6. VERJA OG STIMBRA FØROYSKA LÍVMARGFELDIÐ

Kommunan ger greiðar ætlanir um, hvussu náttúran og lívið í henni skulu verjast – t.d. at rotta og innræsin plantusløg ikki oyðileggja náttúruna. Serlig fyrilit skulu vera fyri vátlendum, ið eru búpláss hjá heiðafugli og kyktum, sum víggja í lendið, og sum rúma nógvum kolevni.

Vit skulu raðfesta lívmargfeldið og gróðurseta plantur, sum eru natúrligar í Føroyum. Plantulistar við føroyskum sløgum skulu vera til taks til útboð, og kommunan gongur sjálv á odda við at raðfesta upprunaføroyskan plantuvøkstur í kommunalum verkætlanum.

Eisini tekur kommunan stig til samstarv við vinnulív, felagsskapir, borgarar og almennar myndugleikar, so vit í felag kunnu menna átøk at verja og styrkja lívmargfeldið.

**Átak: Kommunan tekur stig til samstørv um at verja lívmargfeldið og átøk at basa innræsnum plantusløgum og skaðadjórum. Kommunan raðfestir føroyskan plantuvøkstur og stuðlar upp undir átøk, sum menna lívmargfeldið.**
*Ábyrgd: Kommunan*

## 7. AVMARKA AMPAR AV ÓLJÓÐI, LJÓSI OG TUNGARI FERÐSLU

Strembast skal støðugt eftir, at menniskju og djór ikki verða nervað av virksemi, sum hevur við sær óljóð, sterkt ljós, royk, dálking og aðrar ampar. Reglugerðir og eftirlit skulu endurskoðast, sum snúgva seg um at avmarka ampar frá vinnuvirksemi og øðrum virksemi nær við bústaðir.

Umhvørvisflokking av virkjum skal endurskoðast, og leiðbeining gerast til vinnu/byggipláss um m.a. tunga ferðslu og ljóðampar.

Ljósdálking er eitt fyribrigdi, sum ger alsamt meira um seg. Ljós frá eitt nú ljóskastarum, gøtulyktum og talgildum lýsingarskermum kunnu órógva. Fyrilit skal havast fyri, at náttarljósið ikki gerst ov nógv í bústaða- og náttúruøkjum.

**Átak: Umhvørvisflokkingar av virkjum, reglugerðir og eftirlit skulu endurskoðast fyri at avmarka umhvørvisampar.**
*Ábyrgd: Kommunan*

**Átak: Tá ið ljósætlanin (Gula ætlanin) verður dagførd, skulu serlig fyrilit vera fyri, at ljós ikki er til ampa fyri náttúru og menniskju.**
*Ábyrgd: Kommunan*

## 8. TILBÚGVING TIL VEÐURLAGSBROYTINGAR

Veðurlagsbroytingar síggjast kring heimin, eitt nú við størri regnmongdum og fleiri ódnum. Býir og lond rundan um okkum fyrireika seg til økta ávirkan av veðurlagsbroytingum, og tað eiga vit í Føroyum eisini at gera. Við veðurlagsbroytingunum økist vandin fyri eitt nú glopraregni, skriðulopum og fyri, at áir floyma yvir.

Tórshavnar kommuna fer at taka stig til at eyðmerkja váðar, sum kunnu standast av veðurlagsbroytingum, og við støði í hesum tryggja, at býarplanlegging, reglugerðir og tilbúgving eru tíðarhóskandi til veðurlagsavbjóðingarnar. Samskiftast skal við landið og aðrar kommunur um møgulig felags átøk í hesum sambandi.

**Átak: Gerast skal váðameting og tilbúgvingarætlan í sambandi við veðurlagsbroytingar.**
*Ábyrgd: Kommunan í samstarvi við landið og aðrar kommunur*









# Útlát og orka

## HØVUÐSMÁL 2

EIN KOMMUNA VIÐ MUNANDI **MINNI ÚTLÁTI** AV **VAKSTRARHÚSGASSI**. **Í 2040 SKAL ÚTLÁTIÐ** AV VAKSTRARHÚSGASSI Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU SUM LANDAFRØÐILIG EIND VERA **NETTO-NULL**

Menniskjaskapta útlátið av $CO_2$ og øðrum vakstrarhúsgassi økir meðalhitan á jørðini. Veðurlagsbroytingarnar, sum standast av hesum, hava við sær stórar avleiðingar kring allan heim. Jøklar bráðna, vatnstøðan hækkar, og økti hitin ávirkar vistskipanir í sjónum og tí eisini liviumstøður hjá fiski og føði hjá sjófugli. Øktar regnmongdir kunnu m.a. elva til skriðulop og leggja trýst á rør- og frárensluskipanir.



# Hetta ætlar kommunan

Yvirskipaða málið hjá Tórshavnar kommunu er, at útlátið av vakstrarhúsgassi skal vera netto-null í 2040. Hetta merkir, at útlát og upptøka av $CO_2$ í kommununi javnviga. Málið skal røkkast við at taka miðvís stig at skifta til varandi orku og við at betra umstøðurnar hjá borgarum at velja grønar loysnir. Eisini skulu átøk gerast, sum økja upptøkuna av $CO_2$ í náttúruni (sum nevnt í undanfarna parti). T.d. verða royndir í løtuni gjørdar í Føroyum við $CO_2$-goymslu í undirgrundini. Tórshavnar kommuna fer at fylgja væl við hesum arbeiði.[6]

Umhvørvisfyrilit skulu vera fastur partur í kommunalari málsviðgerð, og veðurlagsroknskapur skal gerast. Næstu árini verða fleiri átøk sett í verk fyri at minka útlátið frá upphiting, ferðslu og bygging, m.a. skulu allir bygningar hjá kommununi, Bussleiðin og ruskbilar rekast við varandi orkukeldum. Eisini skulu umstøðunar at ferðast til gongu, á súkklu og við kollektivum skipanum betrast.

Sett verða hesi lutmál í sambandi við útlát og orku:

**9** **Allur hiti og streymur hjá kommununi sum stovni kemur frá varandi orku í 2030**

**10** **Størri dentur skal leggjast á fjarhita, nærhita og varandi orkuloysnir**

**11** **Flytførisætlan skal raðfesta bleyta og kollektiva ferðslu**

**12** **Grønar orkuskipanir til flutningstænastur og kommunal akfør**

**13** **Orku- og útlátssparandi tiltøk í allari kommununi**

**6** *https://jf.fo/visindalig-grein-um-foroysku-flaarodina-sum-goymslugryti-til-co2/*

## 9. ALLUR HITI OG STREYMUR HJÁ KOMMUNUNI SUM STOVNI KEMUR FRÁ VARANDI ORKU Í 2030

Tórshavnar kommuna umsitur fleiri bygningar, m.a. skúlar, dagstovnar og eldrabústaðir. Nógvir hava fjarhita, aðrir hitapumpu, og nakrir framleiða orku við sólkyknum. Fólkatalið í kommununi er vaksið umleið 11% millum 2016 og 2024, samstundis eru bygningsfermetrarnir hjá kommununi øktir 33% sama tíðarskeið. Í 2016 vóru 19% av fermetrunum hitaðir við varandi orku. Í 2024 vóru heili 53% av fermetrunum hitaðir við varandi orku. Hóast bæði fólkatal og bygningfermetrar er økt, er samlaða $CO_2$-útlátið frá bygningum hjá Tórshavnar kommunu minkað, somuleiðis er útlátið pr íbúgva pr fermetur minkað. Hóast nakað er hent, vanta grønar loysnir í mongum bygningum og anleggum hjá kommununi.

Kommunan ger tíðar- og íløguætlan fyri orkuskiftið í kommunalu bygningunum, akførum, maskinum o.ø. fyri at tryggja, at málið um varandi orku verður rokkið. Ætlanin verður javnan endurskoðað.

Allir nýggir bygningar, sum kommunan byggir, skulu vera lágorkubygningar og so viðlíkahaldsfríir sum gjørligt. Orkugreining skal gerast av øllum kommunalum bygningum. Ætlan verður gjørd at lýsa, hvør orkukelda hóskar best til ávís øki og bygningar.







**Talva 2a og 2b** *Bygningar og grøn orka hjá Tórshavnar kommunu.*

Viðlíkahald av bygningunum verður raðfest, og ábøtur skulu gerast á verandi bygningar, sum minka orkunýtsluna, t.d. skifta vindeygu og bjálva. Dentur skal leggjast á at minka orkunýtsluna. Allir stovnar hjá kommununi skulu hava orkustýring og vegleiðing til starvsfólk um orkusparing.

**Átak:** **Dagførd tíðar- og íløguætlan verður gjørd til at fremja grøna orkuskiftið í kommunalum bygningum við tí máli, at allir kommunalir bygningar verða hitaðir við varandi orku í 2030. Allir nýggir og umvældir bygningar hjá kommununi skulu lúka lágorkukrøv. Orkustýring skal vera virkið amboð og árlig støðulýsing gerast um orkunýtslu og útlát.**
*Ábyrgd: Kommunan*

**Átak:** **Kommunan fer at gera veðurlagsroknskap fyri at tryggja, at málini, sum kommunan hevur sett sær innan orku og útlát, verða rokkin.**
*Ábyrgd: Kommunan*

**Átak:** **Eitt veðurlagsborgarating verður sett á stovn, sum skal tryggja borgaraluttøku í veðurlagsmálum. Nevndin skal virka sum ráðgevandi pallur, har hugskot og sjónarmið frá almenninginum verða tikin við í arbeiðið at menna og fremja umhvørvisátøk.**
*Ábyrgd: Kommunan*







## 10. STØRRI DENTUR SKAL LEGGJAST Á FJARHITA, NÆRHITA OG VARANDI ORKULOYSNIR

Fjarhitin er nógv útbygdur seinastu árini. Talið á kundum er økt úr umleið 1.000 í 2016 upp í sløk 2.000 í 2025, m.a. eru fleiri stórir bygningar knýttir upp í skipanina.

Fjarhitin skal útbyggjast enn meira og skal fevna um fleiri orkutungar bygningar og grannaløg, serliga har tætt er ímillum húsini. Fjarhitafelagið hevur lagt fleiri rørúttøk í høvuðsleiðingina, so at til ber at leiða fjarhitan víðari til bygningar og grannaløg fram við høvuðsleiðingini. Arbeiðast skal fram ímóti, at tað verður lættari hjá privatum kundum at velja fjarhita, har tað ber til.

Fjarhitin skal vera frá varandi orkukeldum. Í 2024 komu 86% av fjarhitanum frá avlopshita, sum kemur frá Kommunalu Brennistøðini, Sundsverkinum og Förka *(biogass)*. Kommunan fer at virka fyri, at í 2030 kemur allur fjarhiti frá varandi orkukeldum.

Í økjum, har fjarhitin ikki røkkur, skulu møguleikarnir kannast fyri øðrum hitaloysnum, eitt nú sjóhita, sólorku, jarðhita, hitapumpum o.ø. Bústaðamynstrið broytist við tættari bygging, og hetta leggur upp til felags orkuskipanir. Har grannaløg ynskja felags orkuloysnir, eigur kommunan at samskifta við og vegleiða hesi um at finna hóskandi loysnir.

**Átak: Arbeiðast skal fyri, at ein størri partur av kommununi gerst partur av felags, grønum orkuloysnum. Miðað verður eftir, at allur fjarhiti kemur frá avlopshita og varandi orkukeldum í 2030.**
*Ábyrgd: Kommunan og SEV*

## 11. FLYTFØRISÆTLAN SKAL RAÐFESTA BLEYTA OG KOLLEKTIVA FERÐSLU

Bleyta og kollektiva ferðslan skal hava týðandi raðfesting í býarplanleggingini.

Útlátið frá ferðsluni skal minka, og vit skulu endurhugsa, hvussu ferðsla verður skipað. Ætlanin skal taka støði í umhvørvinum, trygd og tørvinum hjá teimum, sum ganga, súkkla og nýta kollektiva ferðslu, soleiðis at færri hava tørv á at koyra í persónbili. Færri bilar hava við sær minni útlát. Við minni bilaferðslu er eisini betri rúmd fyri fólki til gongu, meira lív verður í gøtum/býlingum, og lægri útreiðslur verða til asfalt og vegir.

Súkklu- og gonguleiðir skulu raðfestast í vegagerð og býarplanlegging. Tryggjast skal betri sambinding millum býlingar, skúlar, stovnar og størri arbeiðspláss. Í tættbygdum øki skulu gongu- og súkklubreytir kunna skipast saman. Gerast skulu bilfrí øki og øki við lágari hámarksferð, har súkklandi og fólk til gongu hava fyrimun. Høgligt skal vera at ganga og súkkla alt árið, og tí er neyðugt, at kavarudding hevur fyrilit fyri bleytu ferðsluni. Kommunan tekur stig til samstarv/samskifti við Strandferðsluna og Landsverk um umhvørvisliga góðar loysnir at ferðast í kommununi og millum kommununa og aðrar partar av landinum.

**Átak:** Ein flytførisætlan skal gerast, sum leggur dent á bleyta og kollektiva ferðslu. Ætlanin skal grundfestast í samráð við borgarar. Eisini skal býarplanlegging taka støði í flytførisætlanini.
*Ábyrgd: Kommunan*

**Átak:** Við skúlar, bussskýli og onnur almenn støð skal súkkluparkering vera. Parkeringspláss skulu markast til akfør við varandi orku og deilibilar, og fleiri løðistøðir setast upp í samráð við SEV. Kommunan tekur stig til samstarv við Landsverk og SSL um grønari ferðamøguleikar.
*Ábyrgd: Kommunan í samstarvi við SEV, SSL og Landsverk*

**Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU** ERU SKRÁSETTIR **11.932 PRIVATBILAR** (MAI 2025). HETTA ER UMLEIÐ **1,4 BILUR FYRI HVØRT HÚSKI**

*Kelda: Akstovan og Hagstova Føroya*

## 12. GRØNAR ORKUSKIPANIR TIL FLUTNINGSTÆNASTUR OG KOMMUNAL AKFØR

Strembanin eftir at minka útlátið av vakstrarhúsgassi skal eisini fevna um akfør og maskinur, ið verða nýtt til ymsu tænasturnar, sum kommunan veitir borgarunum. Eitt týðandi stig á leiðini er ruskinnsavningarskipanin. Nýggjur sáttmál um ruskinnsavning, sum kemur í gildi 1. okt. 2026, ásetur, at skipanin skal rekast við el-akførum.[7]

Eisini Bussleiðin skal koyra við varandi orku. Seinastu árini eru royndir gjørdar við tveimum el-bussum í kommununi, og hesar hava eydnast væl. Í 2027 skulu allir bussar hjá Bussleiðini koyra við varandi orku.[8]

Harumframt skulu allir persón- og vørubilar hjá Tórshavnar kommunu so vítt gjørligt vera skiftir út til akfør við varandi orku. Tað sama er við akførum, ið verða nýtt til kavarudding og reinhald, umframt maskinur og aðra størri útgerð. Við at skifta til akfør við varandi orku verður minni útlát av vakstrarhúsgassi og minni dálking og óljóð.

**Átak: Akfør hjá kommununi skulu so vítt gjørligt rekast við varandi orku. Súkklur og elsúkklur skulu vera til taks hjá starvsfólki til arbeiðsørindi.**
*Ábyrgd: Kommunan*

7 *https://www.torshavn.fo/tidindi/sattmali-um-ruskinnsavning-undirskrivadur*

8 *Tórshavnar býráð samtykti í mars 2022, at umleggingin av allari Bussleiðini til grøna orku skal vera framd í seinasta lagi í 2027 - https://www.torshavn.fo/tidindi/bussleidin-100-umlegging-til-groena-orku-i-2027*

## 13. ORKU- OG ÚTLÁTSSPARANDI TILTØK Í ALLARI KOMMUNUNI

Umframt bygningar og ferðslu skulu átøk gerast á øðrum økjum fyri at minka um útlátið av vakstrarhúsgassi. Kommunan fer eitt nú at virka fyri, at skip sum leggja at í Tórshavnar Havn kunnu fáa landstreym.[9] Tað sparir orku, útlát og minkar um ampar av royki og gangi.

Farast skal frá ljóskeldum, sum nýta nógva orku, til útbúnað við LED og ljósstýring, ið gagnnýtir el-orkuna munandi betur. Arbeiði hevur verið í gongd at skifta til orkusparandi LED-ljós, og hetta skal gerast liðugt.

Eisini skal ljósætlanin *(Gula ætlanin)* dagførast við tí fyri eyga at tryggja orkusparing, standardisering, estetikk og avmarkaða ljósdálking.

Kommunan skrásetir orkudátur. Skrásetingin skal gerast eitt virkið amboð í strembanini eftir at røkka málunum um eina grønari kommunu og skal m.a. nýtast til at gera ein veðurlagsroknskap, sum lýkur altjóða krøv. Fólk eigur at verða sett til at taka sær av skipanini, og starvsfólk/stovnar undir kommununi skulu gerast meira tilvitað um skipanina og nýta hana meira virkið. Regluligar støðulýsingar skulu gerast av orkunýtsluni.

9 *ES krevur, at í 2030 skulu øll ferðafólkaskip og bingjuskip nýta landstreym í stórum havnum.*



**Átak:** **Í seinasta lagi í 2027 skal ein ætlan vera gjørd um, hvussu skip, sum leggja at í Tórshavnar kommunu, kunna fáa landstreym.**
*Ábyrgd: Kommunan - saman við landi, kommunum, SEV og reiðaríum*

**Átak:** **Ljósætlanin (Gula ætlanin) skal dagførast við serligum denti á orkusparing, standardisering, estetikk og avmarkaða ljósdálking. Øll gøtuljós skulu vera LED í 2030.**
*Ábyrgd: Kommunan*

**Átak:** **Skipanin við orkustýring skal vera eitt virkið amboð og regluligar støðulýsingar gerast.**
*Ábyrgd: Kommunan*





# Ringbúskapur og burturkast

HØVUÐSMÁL 3

**EIN KOMMUNA VIÐ BURÐARDYGGARI NÝTSLU OG MINNI BURTURKASTI.** SAMLAÐA NØGDIN AV BURTURKASTI AT BRENNA SKAL **MINKA 20%** Í 2030 SAMMETT VIÐ 2024

Vaksandi mongdir av burturkasti eru ein stór avbjóðing. Vit brúka ov nógv og tveita ov nógv burtur. Fyrst og fremst gera okkara nýtsluvanar, at ov nógv náttúrutilfeingi verður brúkt til vøruframleiðslu. Hetta elvir til óneyðugt útlát av vakstrarhúsgassi og ávirkar lívmargfeldið.[10] Nógv orka skal brúkast til at burturbeina alt, vit tveita burtur. Nógv burturkast endar í náttúruni, t.d. plast, sum elvir til umfatandi dálking í heimsins høvum. Burturkast krevur bæði brennikapasitet og lendi til tyrving. Brenning og tyrving elva harumframt til útlát av vakstrarhúsgassi.[11]

**10** *https://overshoot.footprintnetwork.org/newsroom/country-overshoot-days/*

**11** *www.us.fo/vitanargrunnur/burturkast/*


IR 050
skilir tú?

# Hetta ætlar kommunan

Tórshavnar kommuna fer miðvíst at arbeiða fyri at minka nøgdirnar av burturkasti, bæði frá kommununi sum stovnur, frá vinnu og frá borgarum. Málið er, at samlaða nøgdin av burturkasti, sum verður brent, minkar 20% í 2030 sammett við í 2024.

**Brent á Hjalla (tons)***




**Talva 3** *Burturkast brent á Kommunalu Brennistøðini frá 2016-2024. Vinnuburturkast er partur av tølunum.*

**Í 2019 og 2022 vórðu størri umvælingar gjørdar á Kommunalu Brennistøðini, og nakað av burturkastinum varð sent til Danmarkar at brenna.*

*Kelda: Kommunala Brennistøðin*

Ofta verður ljós varpað á skiljing í sambandi við burturbeining. Hetta er eisini sera umráðandi, men í samsvari við ringbúskapin er minni nýtsla fyrsta stigið, sum víst verður á myndini á næstu síðu. Átøk at minka nýtslu kunnu fevna bæði um borgaran og kommununa innanhýsis, eitt nú við tilboðum, ið stuðla longri livitíð til lutir, og tilboðum, har fólk kunnu læna heldur enn at keypa nýtt.[12]

Kommunan fer at endurhugsa burturkastøkið og gera tað lættari hjá øllum at velja umhvørvisvinarligar loysnir. Landsmyndugleikarnir arbeiða við nýggjari kunngerð um burturkast, sum væntandi fer at áleggja landi og kommunum at gera ætlanir fyri burturkast. Sjálv fer kommunan at taka stig til at minka nýtsluna, og at minni fer til spillis.

Í innkeypspolitikkinum skulu raðfestast vørur og tænastur við minst møguligari skaðiligari ávirkan á umhvørvið - bæði lokalt og í framleiðaralondum. Eisini fer kommunan at veita meiri kunning og hagtøl um endurnýtslu og ringbúskap.

**12** *https://www.bbs.fo/byarbokasavnid/vaksin/lutasavnid Page 23*




**Burturkaststigin** *Burturkaststigin hevur fimm trin:* **1.** *Fyribyrging,* **2.** *Endurnýtsla,* **3.** *Endurvinning,* **4.** *Orkuútvinning og* **5.** *Tyrving. Tess hægri tú kemur á stiganum, tess betri er tað fyri umhvørvið.*

*Kelda: Kommunala Brennistøðin*

Hesi lutmál verða sett í sambandi við ringbúskap og burturkast:

**14** **Kommunala Brennistøðin skal nýhugsast og framtíðartryggjast**

**15** **Tilvitað nýtsla og minka burturkast**

**16** **Burðardygg byggivinna**

**17** **Varandi loysnir til matleivdir og lívrunnið tilfar**

**18** **Nærskiljing og lættari at sleppa av við burturkast**

**19** **Minni nýtsla**

**PLAST** ER EIN **STÓR DÁLKINGARKELDA** OG HEVUR STÓRAR AVLEIÐINGAR FYRI M.A. SJÓFUGL. METT VERÐUR, AT UMLEIÐ **150 MILLIÓNIR TONS** AV PLASTI ERU Í HEIMSHØVUNUM Í DAG, OG HELDUR GONGDIN FRAM, VERÐUR MONGDIN FERFALDAÐ Í 2050

*Kelda: WWF* [13]

## 14. KOMMUNALA BRENNISTØÐIN SKAL NÝHUGSAST OG FRAMTÍÐARTRYGGJAST

Kommunala Brennistøðin (KOB) er frá 1987. Seinni er økið víðkað við Endurnýtsluni og umhvørvisviðgerð av bilum. Uppgávurnar hjá KOB eru m.a. at heinta og brenna burturkast, tøma rottangar og veita avlopsorku til fjarhita. Seinastu 20 árini eru ongar útbyggingar hendar á KOB, tó at ábøtur eru framdar. Samstundis er kommunan nógv vaksin. Bygningar og tól eru slitin, og tørvur er á umvælingum/útskiftingum og at skipa økið rundan um Brennistøðina betur.

Ein langtíðarætlan skal nýhugsa burturkastøkið í kommununi. Hon skal m.a. leggja dent á endurnýtslu, endurvinning, umvæling, betri umstøður at skilja burturkast, undirvísing/kunning og góð hagtøl.

Tað skal vera lætt hjá borgarum og vinnu at finna upplýsingar og tilfar um góðar umhvørvisvanar. Umhvørviskunningin hjá kommununi skal vera sjónligari, t.d. við egnari heimasíðu ella týðiligari raðfesting á kommunalu heimasíðuni. Stig verða tikin til sjónligari hagtøl og betri kunning/vegleiðing. Eisini skulu upplatingartíðirnar hjá KOB og endurnýtslustøðunum endurskoðast.

Kommunan og KOB taka stig til samstarv við vinnuna um at minka vinnuburturkast og tryggja, at meira verður endurnýtt. Gott byggitilfar skal endurnýtast. Við at leingja livitíðina á byggitilfari minkar nýframleiðslan av tilfari, og nøgdirnar av burturkasti frá byggivinnuni minka. Tá ið størri bygningar verða tiknir niður, eigur hetta at verða gjørt í samráð við KOB soleiðis, at so nógv sum gjørligt kann endurnýtast.

**13** *https://wwf.panda.org/wwf_news/?4959466/Ocean-plastic-pollution-to-quadruple-by-2050-pushing-more-areas-to-exceed-ecologically-dangerous-threshold-of-microplastic-concentration*

**Átak:** Langtíðarætlanin, sum er í gerð fyri Kommunalu Brennistøðina, skal taka støði í ringbúskapi.
*Ábyrgd: Kommunan*

**Átak:** Umstøðurnar á Kommunalu Brennistøðini verða betraðar, so at til ber at skilja meira tilfar frá vinnu og borgarum. Endurnýtslupláss og høll verður gjørt, so at byggitilfar og annað verður skilt og endurnýtt.
*Ábyrgd: Kommunan*

**Átak:** Kommunan tekur stig til miðvísa kunning um umhvørvisspurningar. Hetta fevnir m.a. um sjónligari hagtøl um burturkast og útlát umframt undirvísingartilfar um burðardygd. Kunningin skal venda sær til bæði borgarar, vinnu og starvsfólk í kommununi.
*Ábyrgd: Kommunan*




Endurnýtslan

## 15. TILVITAÐ NÝTSLA OG MINKA BURTURKAST

Veðurlagsfyrilit, umhvørvi og ringbúskapur skulu vera sjálvsagdur partur av øllum virksemi og ætlanum hjá Tórshavnar kommunu. Hesi skulu hava týðandi pláss í málsviðgerð og innkeypspolitikki.

Raðfestar verða stuttfluttar vørur við lágum $CO_2$-útláti. Tá ið valt verður ímillum vørur og tænastur frá veitarum, verður eisini hugt eftir, hvør veitari tekur flest umhvørvisfyrilit.

Dentur skal leggjast á minni keyp. Felags ætlan at minka burturkast skal gerast fyri fyrisiting og allar stovnar undir kommununi, og krøv verða sett um skiljing og endurnýtslu av innbúgvi, teldubúnaði o.ø.

Skynsom nýtsla skal hugsast inn í alt virksemi hjá kommununi. Heldur enn at keypa nýtt skal altíð kannast, um nakað av tí verandi kann brúkast. Verður skift út, skal kommunan geva øðrum møguleika at keypa/brúka tilfarið, t.d. á útboðsportali. Eisini má vera lætt hjá kommunalum stovnum at útvega brúkt innbúgv, ið kommunan eigur á goymslu. Yvirhøvur skal bert keypast, byggjast, brótast, málast og gravast, tá ið tað er neyðugt. Viðvíkjandi bygningum skal dentur leggjast á umvæling heldur enn nýbygging. Umráðandi er at viðlíkahalda bygningar, so teir ikki farast. Í nýbygging skal hugsast um útlát frá lívsringrásini hjá bygninginum. Tilfar við lágari $CO_2$-slóð verður raðfest.

**Átak:** **Miðvís ætlan verður gjørd at minka burturkastið hjá kommununi sum stovnur. Innanhýsis mannagongdir skulu tryggja, at gott tilfar verður endurnýtt og ikki koyrt burtur. Ætlanin skal fevna um fyrisiting og allar stovnar hjá kommununi.**
*Ábyrgd: Kommunan*

**Átak:** **Innkeypspolitikkur og byggipolitikkur hjá Tórshavnar kommunu skulu raðfesta tilfar, vørur og tænastur við lágari $CO_2$-slóð.**
*Ábyrgd: Kommunan*

## 16. BURÐARDYGG BYGGIVINNA

Byggivirksemi brúkar lendi og letur út nógv $CO_2$, bæði tilfarsframleiðsla, byggitilgongdin og orkunýtsla í lidna bygninginum.

Sum størsti kommunali byggiharri í landinum hevur Tórshavnar kommuna serliga ábyrgd at byggja umhvørvisliga burðardygt. Byggilendið má brúkast skynsamt, byggitilfar endurnýtast og nýhugsandi, burðardyggar verkætlanir raðfestast, sum taka atlit at náttúruni og lívsgóðskuni hjá borgarunum. Vit skulu leggja dent á at hava náttúruøki og rekreativ øki, so borgarin hevur náttúruna nær.

Vit skulu harumframt hava eyga fyri at endurnýta og transformera bygningar/hús, sum av onkrari orsøk standa tóm meginpartin av árinum.

Tórshavnar kommuna fer at gera eina burðardygdarætlan fyri bygging, sum eisini hevur virðing fyri nærumhvørvi og byggilist. Ein slík ætlan lýsir og setir treytir fyri m.a. orkunýtslu, tilfari og lendisnýtslu.

Kommunan fer at arbeiða fyri, at galdandi byggikunngerð, BK17,[14] verður endurskoðað, so hon bæði tekur støði í føroyskum viðurskiftum og umhvørvisliga er á sama stigi sum í grannalondunum. Kommunan fer eisini at arbeiða fyri, at nýggir, kommunalir bygningar kunnu burðardygd-sertifiserast og orkumerkjast.

**Átak: Kommunan raðfestir nýhugsandi byggiverkætlanir, sum leggja dent á burðardygd, skynsama lendisnýtslu og lágt útlát av vakstrarhúsgassi. Tilgongdin at gera eina burðardygdarætlan fyri bygging í kommununi skal byrja.**
*Ábyrgd: Kommunan*

**14** *BK17 er bygd á danska byggikunngerð frá 2008-2015. Í galdandi byggikunngerð í Danmark eru umhvørviskrøvini nógv herd.*

## 17. VARANDI LOYSNIR TIL MATLEIVDIR OG LÍVRUNNIÐ TILFAR

Umleið helvtin av húsarhaldsburturkasti, sum verður brent, er lívrunnið tilfar, sum kann gerast til tøð og biogass.

Ein royndarskipan[15] er byrjað, har nakrar matstovur, matvøruhandlar og Landssjúkrahúsið skilja frukt og grønmeti frá burturkastinum og lata tað í bingjur, sum verða heintaðar regluliga og fluttar á biogassverkið, Förka.

| *Ár* | *Mongd (kg)* |
|---|---|
| 2023 | 32.000 |
| 2024 | 22.140 |
| 2025 | 33.560 |
| *Tilsamans* | 87.700 |

**Talva 4** *Lívrunnið burturkast í royndarskipanini, sum er flutt á biogassverkið Förka.*
*Kelda: Tórshavnar kommuna*

Saman við matvørumyndugleikunum skal strembast eftir at fáa eina varandi skipan, sum eisini kann fevna um matleivdir av seyði og øðrum djórum.[16]

**Átak:** **Saman við matvørumyndugleikunum skal loysn finnast á avbjóðingini við matleivdum og øðrum lívrunnum tilfari, soleiðis at hetta kann nýtast til biogass, sankutøð o.a.**
*Ábyrgd: Kommunan og landið*



**15** *Royndarskipanin er úrslit av verkstovunum, sum vóru hildnar í 2022 í sambandi við umhvørvispolitikkin.*

**16** *Orsakað av vandanum fyri ridluskriða eru matleivdir av seyði og øðrum djórum ikki við í skipanini.*

## 18. NÆRSKILJING OG LÆTTARI AT SLEPPA AV VIÐ BURTURKAST

Borgarar og vinna skulu so ómakaleyst sum gjørligt kunna skilja og sleppa av við burturkastið. Hjá borgarum skal ikki vera neyðugt at hava egnan bil fyri at kunna sleppa av við burturkast.

Innsavningarskipanin skal nýhugsast, og endurnýtslustøðir og smærri goymslur setast upp í nærumhvørvinum. Í nýggjum bústaðaøkjum skal nærskiljing altíð hugsast inn í verkætlanina. Eisini skulu endurnýtslustøðir setast upp í verandi býlingum og aðrastaðni.

Bygdir og oyggjar í kommununi skulu hava góðar møguleikar at skilja og sleppa av við burturkast. Nøktandi bingjukapasitetur má vera til slakt og annað virksemi.

**Átak: Smærri skiljistøðir verða settar upp í býarpørtum, og nærskiljing skal altíð hugsast inn í nýggj bústaðaøki. Allir býarpartar skulu hava skiljistøð í 2028.**
*Ábyrgd: Kommunan*

## 19. MINNI NÝTSLA

Tórshavnar kommuna fer at arbeiða fyri at minka um nýtsluna av tilfari og vørum við at fremja loysnir, ið gera tað lættari hjá borgaranum at velja skynsamt.

Minni nýtsla er at avmarka óneyðugt keyp og eisini at leingja livitíðina hjá lutum, eitt nú við umbøting og felags nýtslu.

Eisini fevnir minni nýtsla um at stuðla og menna deilitænastur, har borgarar kunnu læna, deila ella leiga heldur enn at eiga.

**Átak: Kommunan stuðlar umbøtanar- og deiliátøkum, eitt nú við at samstarva við fyritøkur og felagsskapir, ið byggja á hesi hugtøk.**
*Ábyrgd: Kommunan*

**Átak: Kommunan kannar møguleikan at hava støð í bygdum og býlingum, har til ber at læna amboð, útgerð og annað.**
*Ábyrgd: Kommunan*



**UMHVØRVISPOLITIKKUR**
FYRI TÓRSHAVNAR
KOMMUNU **2026-2032**